VIÐMERKINGAR

# Føroyar – glæstrimynd ella brotmynd?

**Sámal Matras Kristiansen,**
*samfelagsfrøðingur*



*”- Tað verður tjóð okkara til vanlagnu, at myndugleikar landsins stuðla uppundir at góðtakahomoseksuellanlevnað sum nakað náturligt.”*
**Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, 22.august í Sosialinum**

Í summar var (enn einaferð) mikið kjak um tey samkyndu og teirra pláss í samfelagnum. Mótstøðan var – enn einaferð – stór móti at tey samkyndu skuldu sleppa at gerast ein partur av samfelagnum, ella rættari: at góðtakast sum ein partur av samfelagum. Hinvegin vóru eisini sera nógv, ið sýndu teimum samkyndu stuðul á hendan ella handan hátt.

Men hetta kjakið hevur verið fyrr, og tað fer at koma upp aftur ferð eftir ferð, og fer at koyra í somu foyru ár eftir ár, um ikki fólk so smátt byrja at kjakast um nakað djypri enn bert prinsipielt ”fyri ella ímóti skrásettum paralagi”. Kjakið um tey samkyndu er í grundini eitt symptom uppá nakað nógv størri – sum eisini felag teirra samkyndu, Bogin, saman við Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, royndi at vísa á: Støða teirra samkyndu er eitt symptom uppá støðuna í samfelagnum, og varð samanlíkningin eisini gjørd við tiltikna kanariufuglin í kolanáminum, ið varð nýttur sum tekin um iltmangul í kolanáminum. Um erkvisni kanariufuglurin knappliga datt niður av sínum pinni, merkti hetta, at iltmongdin í náminum var um at sleppa upp, og at nú vóru stundir at taka til rýmingar.

Eisini hava kanningar úr útlondum víst, at í einum samfelagi, har tey samkyndu ikki trívast og tískil ”detta av pinninum”, er nakað álvarsligt áfatt. Vantandi trivnaðurin hjá samkyndum (ella øðrum marginalum minnilutum) er eitt symptom uppá eina samfelagssjúku, ið onkursvegna noyðist at lekjast sum skjótast gjørligt, áðrenn sjúkan fær fastatøkur og gerst ein inngrógvin partur av samfelagskroppinum. Læknarnir, ið skulu lekja sjúka samfelagið, eru teir fólkavaldu politikararnir, ið skulu eitast at tora at taka avgerðir, ið kunnu tykjast beiskar í fyrstuni, men sum fara at hava eitt ”heilsufremjandi” árin við tíðini, um málið skal vera at skapa eitt gott samfelag fyri tey flestu og ikki bara tey fáu.

Tíverri tykist, sum um tað er ringt hjá teimum fólkavaldu í einum so lítlum landi at leggja seg út í tabu-evni. Lættari er bara at lata evnið fara framvið; at royna at tiga tað burtur, og vóna at tað ikki stingur seg uppaftur enn á sinni. Royndirnar vísa tó, at tabu-evni hava tann merkiliga eginleika allatíðina at stinga seg uppaftur. Annars vóru tey jú ikki tabu-evni, men týdningarleys evni. Men henda ræðslan fyri at nerta við tabuiserað evni er í sjálvum sær ein trupulleiki, ja í grundini ein prinsipiellur, fólkaræðisligur trupulleiki. Við øðrum orðum leggja tveir grundleggjandi samfelagstrupulleikar seg uppat hvørjum øðrum: 1) ”*illviljin móti at taka ímóti tí nýggja*” og 2) ”*ræðslan fyri at nerta við tabu-evni*”. Hetta merkir á ein keðiligan hátt, at ”tað nýggja” hevur lyndi at verða tabuiserað, bara tí tað er nýtt, og tað sigur seg sjálvt, at hesum kann einki framkomið land liva við í longdini, um tað framhaldandi vil vera framkomið í mun til onnur lond.

Eg ætli mær tískil at hjálpa politikarunum á veg við einari diagnosu uppá hvussu man vera statt í føroyska samfelagnum. Tað vit síggja í dag, er at samfelagið á einum bógvi gerst alsamt meiri fragmenterað, t.v.s. einstaklingagjørt, men á hinum bógnum samstundis leitar sær aftur í meiri siðbundnar samanhangir og í nøkrum førum enntá leitar aftur í eina veruliga fundamentalismu, ið í føroyskum høpi mest av øllum verður til ”kristna fundamentalismu”, men eisini í nøkrum førum gerst til eina ”tjóðskaparliga fundamentalismu” – t.v.s. nationalismu.

### Samfelagið sum listarverk

Eg havi í hesi kronikk valt at nýta eina listfrøðiliga ímynd til at lýsa ímyndina av samfelagnum. Eg síggi – sum realistur (vísindaástøðiligt hugtak, sí Andrew Sayer, 2000) – samfelagið sum ein objektivan veruleika. Men samstundis góðtaki eg ikki eina fatan av, at menniskjaliga fatanin av hesum objektiva veruleika er ein objektiv niðurfelling av objektiva veruleikanum gjøgnum menniskjaligu sansirnar og harfrá víðari út í málið. Menniskjuligi – ella sosiali – veruleikin er altíð subjektivur. Menniskjuligur objektivitetur (sum t.d. í orðingini ”objektivur tíðindaflutningur”) gerst ongantíð annað enn intersubjektivur, t.v.s. eitt úrslit av eini semju um hvussu tingini ”eru” (les: tykjast). Við øðrum orðum er samfelagið – sum menniskjað sær tað – ein tulking. Samfelagið og strukturar tess eru tulkingar av ”tí, ið veruliga er”, og á hendan hátt gerst greitt, at samfelagið altíð tykist ymiskt alt eftir hvør tú ert og hvaðani tú sært. Eins og við einum listarverki, hevur perspektivið avgerandi týdning fyri hvussu heimurin ”sær út”.

Eg nýti tveir málningametaforar í hesi grein: ”glæstrimynd” og ”brotmynd”. Glæstrimyndin er t.d. vakra myndin av bygdini, ið hongur yvir sofuni í stovuni, og er hendan myndin vanliga realistisk ella naturalistisk, t.v.s. at ein sær beinanvegin hvat myndin lýsir. Glæstrimyndin samsvarar í stóran mun við okkara ”sjálvsagda” veruleika. Brotmyndin (fragmentið) er hinvegin ikki altíð í samsvari við seg sjálva. Brotmyndin kann vera mótsigandi, ja kanska stundum meiningsleys. Brotmyndin krevur ikki, at alt hongur saman í eini størri heild, men kann júst vera vøkur, um tú væl at merkja góðtekur hennara kompleksitet og fjølbroytni. Tað krevur tó eitt ávíst tolsemi at góðtaka, at samfelagið alt meiri umskapast til eitt ”fragmentariskt samfelag”, har fólk hava teirra egnu lívsleiðir og ikki góðtaka at verða sett í bás frá barnsbeini. ”Samfelagið sum brotmynd” er ein stór avbjóðing fyri okkum mangan trongskygdu føroyingar, ið gjøgnum øldir hava verið uppvandir við at ”kenna okkara pláss”. Hetta er sjálvandi ikki nakað, ungdómurin nú á døgum kann góðtaka, tí hví skal man lata vera við at gagnnýta teir møguleikar, ið modernaði heimurin býður? Hví skal man góðtaka at avmarka egna lívsførslu (t.d. avnokta egnan homosexualitet) fyri at kunna hóska inn í gamalkendu glæstrimyndina? Hví skal man leggja seg í ”andaligt stavnsband” fyri at varðveita illusiónina um eitt sjálvsamanhangandi samfelag?



### Í hernað móti modernitetinum?

Fyrsti spurningurin, ið er neyðugur at spyrja, er um tað er ein røtt eygleiðing, at samfelagið er við at detta frá sær sjálvum (fragmenterast), serliga tá veruleikin er at heimurin verður alsamt betri samanknýttur við vegum, telesambandi, interneti o.s.fr. Men líkamikið hvat svar vit mega finna, so er tað ein sannroynd, at heimurin fyri mong missir sín innara, sjálvsagda samanhang; sín ”faktisitet”. Heimurin er ikki longur tað sama fyri allar borgarar. Hóast tað ikki altíð verður gjørt, so er møguleikin til staðar at velja øðrvísi sjónarmið og øðrvísi hættir at síggja og skilja heimin. Í hesum fragmenteraða høpi verða tey samkyndu sædd sum ein trupulleiki, ja ein hóttan ella ein ”vanlagna”, fyri samfelagsliga samanhangin, tí at tey ikki hóska inn ímillum ”normalføroyingarnar”.

Annar spurningurin er, um tey samkyndu so veruliga eru ein trupulleiki, ella kanska heldur eitt symbol uppá ein annan trupulleika. Tað kann lættliga staðfestast, at tey samkyndu neyvan kunnu vera ein hóttan móti samfelagnum, tí hvussu kann tað skaða ein ”triðja persón”, at ”fyrsti persónur” hevur kynsligt samband við ein ”annan persón” av sama kyni? Einasti persónur, ið kundi verið skaddur av hesum vildi verið sjálvur ”annar persónur”, men av tí at hesin fríviljað hevur valt eitt parlag við ”fyrsta persón”, so er tað beinleiðis órímiligt at nýta hetta sum eina grundgeving. Sostatt má niðurstøðan sjálvandi vera, at samkynt parlag ikki skaðar onnur, og tískil ikki er ein ”veruligur trupulleiki”. Men hóast hetta verða samkynd framvegis sædd sum ein trupulleiki av ávísum ”triðju persónum”, og hendan ótta eiga vit at taka í álvara, hóast hann grundleggjandi er fullkomiliga órímiligur. Pseudo-trupulleikar eru jú eisini trupulleikar, og kunnu ikki skavast innundir teppið sum um einki er hent.

Vit liva undir refleksivum treytum. Vit eru øll somul fordømd til at hugsa frítt, og tey, ið ikki duga nóg væl at hugsa, megna ikki at gerast ein partur av teirri rúkandi menningini, ið heimurin støðugt er í. Alt er umbroytiligt, og um ein ikki megnar at skilja broytingarnar, so er man noyddur at vóna tað besta – ella kanska fylkjast aftanfyri onkrum (einum førara ella profeti), ið tykist ”kenna leiðina”. Øll eru noydd at velja, og øll hava møguleikan at velja frítt, men júst hetta merkir samstundis, at nógv eisini nýta hetta frælsi til ikki at velja frítt.

Á ein paradoksalan hátt kunnu vit tískil tosa um ein ”refleksivan anti-refleksivitet”. Summi fólk ”velja ikki at velja”, ella rættari: tey taka eitt endaligt val, sum so má bera ella bresta, og í føroyskum høpi er hetta valið mangan ”kristin-fundamentalisma”. Hetta gevur hesum fólkum møguleikan at varðveita eina samanhangandi glæstrimynd av heiminum, og soleiðis sleppa tey eisini undan at skula taka ábyrgd fyri alt millum himmal og jørð. Hetta kann Gud (ella Guds sendiboð á jørð) gera fyri tey. Sagt verður eisini, at trúgvandi fólk gerast minni stressað og minni deprimerað – ja, gera færri sjálvmorð enn meiri sjálvrefleksiv fólk. Sæð frá tí sjónarhorninum noyðist ein at staðfesta, at tað at vera trúgvandi veruliga er ein lívsstrategi, ið hevur nakað at bjóða uppá. Tað er á ongan hátt óskilligt, at fólk velja trúnna (heldur enn vitanina), tí trúgvin borgar fyri sálarfriði, og í okkara postmodernistiska malstreymi er gott at hava ein trúgv at troysta seg við, tá vitanin ikki strekkir til. At ákæra trúgvandi fyri býttiskap má sigast at vera beinleiðis skeivt, tí tey trúgvandi hava framt eitt val, og í nógvum førum er hetta eisini eitt gott val, hóast tað gerst ein trupulleiki, um marknaðarkreftirnar krevja at tú allatíðina er til reiðar at umstilla teg, ja at umskapa teg. Við øðrum orðum: at tú ert refleksivur; at tú ”velur at vilja vita”.

### Siðbundni ella modernitetur?

Undir øllum umstøðum vil eg tó í restini av hesi grein tosa um ávikavíst ”siðbundin” (t.d. trúgvandi) og ”modernað” fólk. Hesi seinnu umfata øll tey, ið trúgva (eg nýti orðið